# Norsk countrystjørna umborð á Norrönu

**Tá Norrøna fer countrytúr, so er Bjøro Håland høvuðsnavn, umframt, at fleiri góð føroysk nøvn luttaka. Norski sangarin er kendur og virdur innan countrytónleikin**

Samrøða



Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo



*Kendi norski country sangarin, Bjøro Håland*

Bjøro Håland er sera kent og virt navn innan countrytónleikin. Hann er høvuðsnavn á ársins countrytúri hjá Norrønu og við sær hevur Bjøro Håland 3 tónleikarar úr Nashville.

Bjøro er føddur í 1943 á bóndagarði í Noreg, ið nevndist Håland. Har vuksu hann og fimm systkin upp. Sum 5 ára gamal stóð hann fyrstuferð á palli og 17 ára gamal flutti hann til USA, har hann arbeiddi sum timburmaður og sang á ølstovum. Hann hitti konu sína Liv í Brooklyn, og tey fluttu til Noregs í 1966. Saman eiga tey tvey børn. Fyrsta plátuinnspælingin hjá Bjøro Håland var í 1970.

Bjøro Håland skal í juni eisini spæla til sonevndu heystveitslþuna í North Dakota í USA, har koma hvørt ár eini 60.000 vitjandi.

Umframt, at hann gjørdist stórt navn í Noreg í sjeyti- og áttatiárunum, so fekk hann eisini fótin innum í USA. Orsøkin til undanvindin í USA meta amerikonsku tónleikararnir hansara vera, at Bjøro er millum seinastu "smørsangararnar" innan country. Tey, ið vuksu upp við Jim Reeves og Frank Sinatra, dáma væl, at tað enn eru fólk sum Bjøro, ið hava djúpa og orkumikla rødd.

Bjøri Håland hevur givið 18 útgávur út, ið eru seldar í yvir 4 milliónir eintøkum.

## Heimligar stjørnur

Umframt høvuðsnavnið Bjøro Håland, so eru eisini heimligar stjørnur við á countrytúrinum hjá Smyril-Line við Norrønu.

Karl Martin Samuelsen hevur fingið spælifelagan úr Hjarnum, Eyðun Nolsøe, við sær og saman fara teir at framføra tónleik hjá Eagles. Karl Martin heur verið við síðani sjeytiárini og hevur sum sangari verið við til at seta dám á føroyskan tónleik øll hesi árini. Hann er óivað ein hin mest umbidni, tá tað snýr seg um at leggja røddir til útgávur, og hann hevur verið við á óteljandi útgávum. Kendastur er hann óivað sum sangari í bólkinum Hjarnar og frá samstarvinum við Jóhannus á Rógvu Joensen í bólkinum Joka, ið m.a. hevur eina frálíka útgávu av Eagles-lagnum Peaceful easy Feeling.

Eyðun Nolsøe (ikki hann í Frændum, blðm.) er kendur sum bassleikari í Hjarnum og sum dugnaligur guitarleikari.

Magni Christiansen er kendur sum countrytónleikari og sangari. Hann hevur, hóast hann enn er ungur, mong ár á baki innan tónlekin. Seinnu árini hevur hann sligið navn sítt fast innan gospel og country. Á countrytúrinum spælir Magni løg hjá Allan Jackson.

Driv og Countrybólkurin fara at syrgja fyri dansitónleiknum umborð á Norrønu og gestirnir fáa høvi til sjálvi at royna seg í sangkappingum og undirvísing verður í line-dansi, sigur Njál Reinert, samskipari.

## Útgávur hjá Bjøro Håland

| | |
|---|---|
| Mine Salmer | 2004 |
| Blue Sky | 2000 |
| All The Best | 1995 |
| The Door To My Heart | 1995 |
| Nashville - Here We Go Again | 1990 |
| Rett Fra Hjertet | 1989 |
| By Request | 1988 |
| Bjøro Håland '87 | 1987 |
| Bjøros Beste | 1986 |
| Just For You | 1984 |
| Min Stetson Og Gitar | 1984 |
| On Tour | 1983 |
| Mitt Julealbum | 1983 |
| Bjøro Håland | 1982 |
| My Nashville Album | 1981 |
| To My Friends | 1980 |